# Ógvusligt ferðsluóhapp í Hvalvík



*Reyvin á bilinum fór í knús, gronin fór illa men førarin slapp so at siga snikkaleysur*
*Mynd: Rólant Waag Dam*

**Um áttatíðina í gjárkvøldið var eitt sera ógvusligt ferðsluóhapp í Hvalvík. Ein bilur, sum kom koyrandi norð eftir fór út av vegnum og knústist sundur, men førarin slapp uttan sjónlig mein**

FERÐSLUÓHAPP
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Tað var oman fyri Skretting, at bilurin sum kom koyrandi norð eftir yvirhálaði ein annan. Vátaslettingur var, krapi var lægstur á vegin og førarin misti tamarhaldið á bilinum og fór sendandi niðan av vegnum. Bilurin fór út av við gronini fyrst. Men í sjálvari grøvini slongdist hann einaferð runt, rendi reyvina inn í eina hellu og slongdist upp á aftur vegin, har hann steðgaði við gronini frameftir.

Sum tað sæst á myndini, so er lítið gott eftir av bilinum. Reyvin fór í knús øll sum hon var orsaka av stoytinum inn í helluna, og gronin fór somuleiðis sera illa. Sjálvt førarasetri brotnaði eisini undir óhappinum, men lukkutíð slapp førarin uttan sjónlig mein. Hann gekk sjálvur út í sjúkrabilin, sum flutti hann til Havnar til nærri kanningar.

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av útsynningi, um kvøldið minni vindur. Ælingur og hitin millum 7 og 10 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi, um kvøldið lækkar hann niður í sunnan. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 5 og 8 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Fyrrapartin strúkur í vindi ella hvassur vindur av landsynningi og regn. Seinnapartin minni vindur av suðri og yvirhøvur turt. Hitin millum 6 og 9 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Mánadagin upp í ein strúk av ymsum ættum, týsdagin veksur hann vindin av útnyrðingi. Ælingur og hitin millum 4 og 8 stig.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -8 |
| Nuuk | -5 |
| Qaqortoq | -3 |
| Ammassalik | -10 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | -2 |
| Seyðisfjørður | 1 |
| Tórshavn | 5 |
| Lerwick | 6 |
| Aberdeen | 9 |
| London | 10 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 9 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 9 |
| Keypmannah. | 10 |
| Helsinki | 7 |
| Moskva | 7 |
| Berlin | 12 |
| Warzawa | 12 |
| Kiev | 6 |
| Bukarest | 6 |
| Paris | 14 |
| Madrid | 9 |
| Róm | 18 |
| Malorca | 20 |
| Athen | -- |
| Malta | 20 |
| Tunis | 24 |
| Beijing | 4 |
| New Dehli | -- |
| Bangkok | 35 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | -- |
| New York | 13 |
| Miami | 23 |
| Los Angeles | 16 |
| Meksikobýur | 17 |
| Panama | 30 |
| La Paz | 11 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 21 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt stormlágtrýst, 948 hPa. sunnan fyri Ísland fer spakuliga móti Íslandi og gevur storm á okkara leiðum.




**Í dag:**
Stormlágtrýstið yviri á Eysturlandinum stendur mestsum í stað og grynnist. Lágtrýstið vestan fyri Írland fer í landnyrðing skamt eysturum Føroyar.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 26/10 kl. $06^{00}$– 27/11. $06^{00}$. Hitin í gjár: 5,1° Minsti hiti máldur í november: - 7,2° - Mesti hiti máldur í november: 12,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 17/10 kl. $06^{00}$– 18/10 kl. $06^{00}$ Avfallið higartil í oktober: 0,0 mm




Sosialurin




## VESTFALLSKYRRINDI

28. november Fyrra kvarter
2. desember Mánin næstur jørðini
5. desember Fullmáni

Kelda. Álmanakkin 2006

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 30. Nov. | 02.11 | 14.32 | 01.11 | 13.32 | 01.26 | 13.47 | 04.11 | 16.32 | 05.11 | 17.32 | 00.26 | 12.47 | 11.47 | 23.50 | 02.26 | 14.47 | 03.26 | 15.47 | 01.56 | 14.17 | 03.11 | 15.32 |
| 1. des | 02.54 | 15.17 | 01.54 | 14.17 | 02.09 | 14.32 | 04.54 | 17.17 | 05.54 | 18.17 | 01.09 | 13.32 | 00.09 | 12.32 | 03.09 | 15.32 | 04.09 | 16.32 | 02.39 | 15.02 | 03.54 | 16.17 |
| 2. Des | 03.40 | 16.04 | 02.40 | 15.04 | 02.55 | 15.19 | 05.40 | 18.04 | 06.40 | 19.04 | 01.55 | 14.19 | 00.55 | 13.19 | 03.55 | 16.19 | 04.55 | 17.19 | 03.25 | 15.49 | 04.40 | 17.04 |
| 3. Des | 04.28 | 16.56 | 03.28 | 15.56 | 03.43 | 16.11 | 06.28 | 18.56 | 07.28 | 19.56 | 02.43 | 15.11 | 01.43 | 14.11 | 04.43 | 17.11 | 05.43 | 18.11 | 04.13 | 16.41 | 05.28 | 17.56 |
| 4. Des | 05.24 | 17.52 | 04.24 | 16.52 | 04.39 | 17.07 | 07.24 | 19.52 | 08.24 | 20.52 | 03.39 | 16.07 | 02.39 | 15.07 | 05.39 | 18.07 | 06.39 | 19.07 | 05.09 | 17.37 | 06.24 | 18.52 |